## Sveisisku kassarnir

**1-0: Johan Vonlanthen, 9.**
Føroyska liðið gloymir allar verjuskyldur, tá vit hava fríspark, og so kann Sveis kontra. Fyrst skjýtur Ricardo Cabanas, og tá Jens Martin verður snýttur av hoppandi bóltinum, kann Johan Vonlanthen leggja Sveis á odda.

**2-0: Johan Vonlanthen, 14.**
Eftir at Sveis fyrst hevur spælt upp í vinstru síðu, lyftir Hakan Yakin hegnisliga upp um verjuna, har Vonlanthen var púra blankur, og smekkar framvið Jens Martini.

**3-0: Alexandre Rey, 29.**
Jens Martin fær ikki bóltin nóg langt fram, tá hann sparkar út, og so verður Rey sendir avstað, uttan at føroyska miðverjan fær fylgt við.

**4-0: Alexandre Rey, 44.**
Føroyingar missa bóltin í uppspælinum, og so gongur skjótt hjá Sveis. Bólturin verður spældur upp í høgru, og tætt undir málinum er Vonlanthen kvikari enn Jens Martin Knudsen á bóltinum.

**5-0: Alexandre Rey, 55.**
Pól Thorsteinsson verður yvirspældur í sínum verjuborði, og so er Rey fyrstur á bóltinum, soleiðis at hann fær skotið sítt hat-trick.

**6-0: Johan Vonlanthen, 57.**
Pól Thorsteinsson spælir upp á tvørs inn móti miðvøllinum, og so seta hinir ferð á, soleiðis at Vonlanthen kann gera álopsmakkaranum hat-trickið eftir.



*Byrjanin til endan. Frísparkið, har vit høvdu møguleikan at leggja okkum á odda, men sum endaði við einum sveisiskum kontra, sum ikki skuldi verið gjørligt. Leggið tó eisini til merkis, hvussu langt út sveisiski málverjin er komin*

# Ikki nóg gott

**Føroyska liðið hevði ein av sínum heilt keðiligu døgum í hitanum í Basel. Ein dystur, sum enn einaferð minti á, at skulu vit standa okkum, so er alneyðugt, at allir taka stór tøk í felag**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Basel, Sveis:** Gloymið alt um HM-endaspælið í Týsklandi í 2006. Tann boðskapurin er kanska ikki so óvæntaður, men hann varð í øllum førum so dyggiliga staðfestur í bakandi hitanum í Basel leygardagin.

Snøgt sagt, so vórðu okkara menn fyri einum slíkum lúsingi, sum vit sjáldan hava upplivað nógvu tey seinastu árini. Úrslitið sjálvt sigur 6-0 til mótstøðuna, men tað í sjálvum sær var kanska ikki tað ringasta. Tyngsta byrðan hjá okkara monnum mundi heldur vera, at vit taptu so greitt fyri einum liði, sum als ikki er betri enn so nógv onnur lið, sum vit hava hitt fyrr.

### Barnasjúka kostaði

Hitin á vøllinum var øgiligur, og ivaleyst hevur hann eisini gjørt sítt, at føroyska liðið ongan tíð fekk ordiligt tak á dystinum, men soleiðis eru umstøðurnar nú einaferð.

Og kanska vóru okkara menn heldur ikki heilt klárir mentalt til avbjóðingina. Í øllum førum var talan fleiri ferðir um kostnaðarmikil mistøk, sum verða venjarar í smádreingjadeildini arbeiða við at eliminera.

Fyrsta sveisiska málið var júst eitt slíkt mistak. Føroyar høvdu tá gyltan møguleika, eftir at sveisiski málverjin noyddist at brúka hendurnar, so afturlegging ikki endaði í málinum. Neyðugt hevði í mesta lagi verið at havt fýra leikarar inni í sveisiska brotsteiginum, men føroyingarnir vóru seks í tali. Fróði Benjaminsen var tann einasti, sum samlaði upp uttanfyri, men tá hann so eisini kiksaði, kundu hinir kontra, og triðja mistakið gjørdi Jens Martin so, tá hann bert fekk hálvbjargað fyrru skotroyndini. At dómarin so heldur átti at givið føroyingum nýtt fríspark og gult til sveisiska málverjan, er nakað heilt annað. Men slíkar dómar kann sjáldan roknast við, at vit fáa á heimavølli.

Nakað heilt annað er so tað, at tað helst burdi verið Súni Olsen, sum skuldi tikið sær av frísparkinum. Ivaleyst hevur Claus Bech Jørgensen brellast so nógv eftir hesum møguleikanum, at hann ikki vildi lata hann fara framvið, hóast Føroyar í Súna hava ein leikara, sum við frísparksbóltum sínum livur upp til ein og hvønn leikara í Europa.

### Hálvleikurin ein lætti

Altso gjørdist talan við hesum um ringastu hugsandi byrjanina hjá okkara monnum, og tá teir so hildu á við at geva sveisarunum góðar møguleikar, sum hesir so eisini tóku av, so hingu høvdini nakað nógv meira, enn tey vanliga gera.

Seinasta partin av teimum fyrstu trimum korterunum var kenslan, at hetta kundi gerast heilt óbehagiligt, og tað kendist meira enn nakað sum ein lætti, tá dómarin blásti til hálvleik.

Eftir steðgin var støðan kanska eitt lítið sindur betri hjá okkum. Sveisararnir høvdu ikki tørv á at koyra so øgiligt kol á ketlarnar, og sjálvt um teir fingu tvey mál innan ein minutt tíðliga eftir steðgin, og hóast teir høvdu møguleikar til enn fleiri, so varð tapið avmarkað til tey seks málini, umframt at okkara eisini høvdu nakað av spæli hesa løtuna.

### Frakland órógvaði

Tað hevur verið nakað av skriving seinastu tíðina um at fáa eitt ættarliðsskifti á landsliðnum, og sum so kann væl vera, at ein ávís útskifting eigur at fara fram.

Ivaleyst eru eisini nógvir pennar, sum eftir dystin í Basel seta enn meira ferð á hesa skrivingina, men umtalaða ættarliðsskiftið er fyri langt síðani byrjað. Verður hugt at uppstillingini í Sveis, so vóru hóast alt tríggir av leikarunum í byrjunaruppstillingini leikarar, sum avgjørt hoyra til yngra endan. Bonkurin var mest sum bara mannaður av teimum ungu. Og so er tað eisini í løtuni ilt at síggja, júst hvørjir leikarar, sum ikki longu eru partur av hópinum, skulu skumpa aðrar av. Sjálvandi kann so altíð diskuterast, hvussu teir fyrstu ellivu skulu setast saman, og har kundu onkrir lutir helst verðið gjørdist øðrvísi í Sveis.

Men meira enn hetta, so mundi talan mest av øllum vera um tvinnar trupulleikar, sum gjørdu, at okkara menn fingu ein so stóran bank hesaferð.

Um spælararnir vilja tað ella ikki, so hevur føroyska liðið kanska størstu avbjóðingina nakrantíð nú mikudagin, tá Fraklands-dysturin er á skránni. Og tað er lítið at ivast í, at hóast eingin sigur tað hart, so hevur tann dysturin verið onkra staðni í bakhøvdunum hjá fleiri av leikarunum. Støðan tóktist á ein hátt meinlík henni í Litava fyri tveimum árum síðani. Ta ferðina spældi føroyska liðið kanska vánaligasta dystin í allari undankappingini – tó at tapið varð avmarkað til 2-0 – fyri síðani at vera nær við at skapa eina rimmar sensatión í Hannover.

Sjálvandi eiga leikararnir ikki at hugsa um meira enn næsta dystin, men tað er altso ikki á hvørjum degi, at okkara menn hava møguleika at møta Henry, Vieira og hinum á franska liðnum, so tankin hevur helst vigað nakað kortini.

### Undir støði

Hin trupulleikin var hitin í Sveis. Sjálvandi vóru hitastigini hjá sveisisku leikarunum eins nógv, men í mun til okkara, so er støðan ikki so óvon hjá teimum.

Í øllum førum spældu teir til tíðir tað slagið av fótbólti, sum føroyingar so ofta hava havt alstórar trupulleikar við í dystum móti eitt nú jugoslavia. Tempo'ið í dystinum verður hildið á einum lágum støði, men tá ferð so verður sett á, gongur smáspælið við rúkandi ferð niðan gjøgnum vøllin. Tá nyttar tað lítið, at okkara hálvgum verða ruraðir í blund, tá ferðin er lág, men tað var júst tað, sum hendi. Til tíðir hildu vit kanska eisini, at vit høvdu gott tak á spælinum, men máltalvan sigur jú sína søgu um, at hetta ikki var so.

Samanlagt høvdu hesir báðir lutir við sær, at tað vóru alt ov nógvir av okkara monnum, sum ikki spældu upp til sítt allarbesta. Tað hevur verið prógvað ferð eftir ferð, at tað er ein av fortreytunum fyri góðum úrslitum, og tá tað - sum hesaferð - eru fleiri leikarar, sum tykjast vera undir sínum vanliga støði, so kostar tað. Og tað kostar nógv!




**Til sølu**

**Ognin matr. 1381E og 1381F, Tórshavn, Heykavegur 6, Tórshavn, verður við hesum lýst til sølu**

Til ognina hoyrir virkisbygningur, partvís í tveimum hæddum, til støddar 2.968 m² brutto, privat parkeringsøki til støddar 2.400 m² og stórt alment parkeringsøki. Goymslu-/amboðsskúrar uppá 271 m² hoyra eisini til ognina.

Byggiár: 1978

Ognin liggur væl fyri á ídnaðarøkinum á Hálsi og hevur tvær tilkoyringar.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til Føroya Tele, Jens Wang, tlf. 303030 ella 303007.

FØROYA TELE



Týpan...

Her er Heini. Hann er stjóri. Heini er troyttur av (á)ganginum á skrivstovuni, og nú vil hann hava frið. Heini er týpiska ímyndin av, at tað hevði loyst seg hjá honum at hugsað meira um røttu trygdina hjá sær og starvsfólkunum.

Føroya Lívstrygging kann bjóða eina trygd, ið júst er grundað á avtalu millum leiðslu og starvsfólk. Skipanin eitur Virkiseftirløn og er ein skraddaraseymað loysn við bæði trygging og eftirløn.

Virkiseftirløn er ein eftirlønarskipan við innbygdari trygging.
Virkiseftirløn er grundað á, at ein partur av lønini verður goldin inn í skipanina.
Tá ið eftirlønin verður goldin út, ræður starvsfólkið sjálvt fyri, hvussu hetta skal gerast.
Veljast kann ímillum at fáa alt goldið út í einum ella sum mánaðargjald.

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn · Tel 311111 · Faks 351110
heimasíða www.liv.fo · teldupostur liv@liv.fo

LÍV Føroya Lívstrygging

REPROZ